

AVENSIS 2,4 SOL AUT SEDAN 1C0 — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KP008 **Km:** 19.000
**Árgangur:** 14.06.2006

**Kr. 255.000,-**



COROLLA 1,6 LINEA TERRA SED Svart — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JK362 **Km:** 73.000
**Árgangur:** 22.04.2003

**Kr. 128.000,-**



AVENSIS 2,0 SOL LEÐUR Svart — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JP405 **Km:** 15.000
**Árgangur:** 17.08.2006

**Kr. 255.000,-**



COROLLA 1,4 TERRA D-4D 5D Reytt — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** NK419 **Km:** 45.000
**Árgangur:** 11.07.2006

**Kr. 174.000,-**



AVENSIS 2,0 SOL AUT Sedan Silvur — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** DJ672 **Km:** 24.000
**Árgangur:** 22.07.2005

**Kr. 225.000,-**



AVENSIS 1,8 LINEA SOL AUT Grátt — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HV081 **Km:** 88.241
**Árgangur:** 18.02.2003

**Kr. 124.000,-**

Fyrivarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.



AVENSIS 1,8 SOL AUT SED — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** PK891 **Km:** 67.000
**Árgangur:** 23.03.2004

**Kr. 182.000,-**



AVENSIS 2,0 D-4D SOL SED Svart — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** FR822 **Km:** 58.471
**Árgangur:** 10.07.2007

**Kr. 275.000,-**



AVENSIS 2,0 SOL B SEDAN Silvur — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** BN546 **Km:** 42.232
**Árgangur:** 09.03.2006

**Kr. 228.000,-**



COROLLA 1,4 LUNA B. D-4D — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SF673 **Km:** 88.209
**Árgangur:** 19.05.2005

**Kr. 165.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


# Vilja hava privatan tunnil fyri 130 milliónir



*- Ein tunnil ímillum Kambsdal og Skálafjørð førir eina so stóra sparing við sær, at tað loysir seg væl hjá privata vinnulívinum at gera hann, sigur Sigurð Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði*

**Fuglfirðingar hava útvegað sær privata fígging til ein tunnil úr Kambsdali yvir í Skálafjørð og nú biðja teir landsstýrið um loyvi at fara undir arbeiðið. Teir siga, at bæði fyri samfelag og vinnulív verður tað ein stórur vinningur**

TUNNIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Ein nýggjur tunnil ímillum Kambsdal og Skálafjørð, verður ein stórur vinningur fyri bæði vinnulívið og fyri Samfelagið.

Tað staðfestir Sigurð Simonsen, borgarstjóri í Runavík.

Fuglafjarðar Kommuna hevur nú heitt á landsstýrið um at fara undir ein tunnil ímillum Kambsdal og Skálafjørð.

Men vil Landsstýrið ikki gera tunnilin, vilja fuglfirðingar sleppa at gera hann sjálvir og teir siga, at tað er ongin trupulleiki at útvega fígging til arbeiði.

At gera tunnil ímillum Kambsdal og Skálafjørð er ikki nakað nýtt mál, tí tað eru eini 30 ár síðani, at fuglfirðingar luftaðu tankan fyri fyrstu ferð.

Higartil hevur tað verið til fánýtis, men í eini roynd afturat at fáa gongd á málið hevur Fuglafjarðar Kommuna nú søkt um loyvi til at stovna eitt privat felag saman við øðrum kommunum, vinnulívi og peningastovnum og sum síðani skal gera tunnilin.

Í fjør vildi samgongan ikki ganga umsóknini á møti, tí vinnumálaráðið vísti á, at landið skal standa fyri samferðsluútbyggingum, sum hesari.

Málið kom tó ongantíð til politiska viðgerð í løgtinginum og nú ein nýggj samgonga er komin til, royna fuglfirðingar enn einaferð at fáa gongd á málið.

Tí hava teir enn einaferð heitt á landsstýrið um at fara undir tunnilin. Men raðfestir samgongan ikki hendan tunnilin, biðja fuglfirðingar enn einaferð um loyvi til at stovna eitt privat partafelag at standa fyri arbeiðinum eftir sama leisti, sum ætlanin hevur verið at fara undir Eysturoyartunnilin.

- Vit hava kannað málið og tað hevur gingið væl at útvega privatar íleggjarar til verkætlanina, sigur Sigurð Simonsen.

## Lágt bummgjald

Hann sigur, at útrokningar vísa, at við einum bummgjaldi upp á 10 krónur fyri persónbilar og upp á 40 krónur fyri størri bilar, er hetta ein íløga, sum ber seg væl eftir 30 ár.

Ein tunnil ímillum Kambsdal og Skálafjørð verður einar 2300 metrar langur og fer at kosta 130 milliónir at gera.

- Kanningar hava alla tíðina víst, at ein slíkur tunnil loysir seg væl fyri samfelagið og hesi seinastu árini er ferðslan so nógv økt, at hann loysir seg upp aftur betri í dag.

Sigurð Simonsen sigur, at hesin tunnilin styðjar eisini væl uppundir ætlanina at gera tunnil ímillum Streymoy og Eysturoy tí úr Skálabotni og út á Strendur verður skjótast vegur í undirsjóvartunnilin.

Hann sigur, at kanningar vísa, at ferðslan ígjøgnum ein tunnil ímillum Kambsdal og Skálafjørð, verður so stór, at tað fer at spara einar 50.000 kilometrar í koyring um dagin, umframt at bilarnir sleppa undan at sleipa seg upp um tvey eiði, so fyri umhvørvið hevur tað eisini stóran týdning, tí tað sparir nógv CO2 útlát.


**BESTA ADRESSA Í HAVN TIL LEIGU!**

Stephanssons Hús á Kongabrúnni er til leigu!
Bygningur er í 4 hæddum og hvør hæddin er uml. 66 $m^2$.

Ring 314291, ella skriva til ingvorn@stephanssonshus.fo

